Sosialurin FØROYABANKI

# Alment pallborðskvøld í Miðlahúsinum

**Týsdagin 27. januar 2009 klokkan 19.30**

**Evni: »Rætturin til tað góða lívið«**

Um vit góðtaka at fólk drekka, mugu vit hava í huga, at ovurnýtsla av rúsdrekka kann taka tað góða lívið frá teimum avvarðandi.

Við pallborðið sita tvey avvarðandi hjá rúsmisnýtarum og umboð fyri Blákrossheimið og Heilbrigdið.






Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

ókeypis.fo

...fá meira fyri einki!

Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

Starvslýsing

Heimatænastan

## Deildarleiðari og sjúkrarøktarfrøðingur Norðoyggjar

1) Søkt verður eftir deildarleiðara til Sambýlið á Heygnum frá 1. mars 2009.

2) Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi til Heimatænastuna frá 1 mars 2009.

Er tú ígongdsetari, torir at ganga nýggjar leiðir, fleksibul, erlig og opin fyri nýggjum avbjóðingum, er tað tær vit hava brúk fyri.

Høvuðsuppgávan er at hava dagligu leiðsluna av Sambýlinum og at veita sjúkrarøkt til búfólk, sum eru sjúk.

Sambýlið veitur búfólkunum røkt og umsorgan í heimligum umhvørvi.

**Ábyrgdarøki**

- Tryggja dygd og samanhang í røktini
- Vegleiða og stuðla starvsfólkunum og næmingum
- Virka fyri at skapa eitt heimligt og trygt umhvørvi
- Virka fyri at avvarðandi og onnur vitjandi til eina og hvørja tíð kenna seg vælkomnan

**Førleiki**

- Heilsufaklig útbúgving
- Hug og hegni at fyrisita og leiða
- Evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu

Talan er um eitt fulltíðarstarv fram til 31.12.2009. Starvið kann setast í niðursettum brøki. Arbeiði er úti í býnum og mest í dagvaktum, við einkultum kvøldvaktum. Arbeitt verður 3. hvørt vikuskiftið.

Meira fast at vita um størvini við at venda sær til Elsbu Lützen, økisleiðari í heimatænastuni á tlf. 222783.

**Setanartreytir**
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í Heimatænastuni í Norðoyggjum. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligum royndum til:

Heimatænastuna í Norðoyggjum
Att. Elsba Lützen
Bøgøta 34
700 Klaksvík

**Umsóknarfreist 9 februar 2009.**

**Les meira á www.naerverk.fo**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Selja bilin? – set hann í Sosialin!

Sosialurin – blaðið øll lesa!

Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.




Sosialurin Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn